**Fylgiskjal 4**

# FØROYSK LUTTØKA Í VIRKSEMINUM

Niðanfyri verður víst til ásetingar í standardloyvinum. Ásetingar um føroyska luttøku í kolvetnisvirkseminum á føroyskum øki eru í §§ 11-15.

## 1. Veruligar møguleikar at bjóða, jvb. § 11

Sambært § 11 skulu føroyskar fyritøkur hava veruligar møguleikar fyri m.a. at veita vørur og tænastur í sambandi við útinning av virksemi sambært loyvum til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum. Føroyskar fyritøkur skulu hava møguleika at bjóða í kapping við útlendskar fyritøkur.

Landsstýrismaðurin hevur sett í verk mannagongdir, sum áseta, hvussu hendan skyldan skal lúkast og um skyldu hjá loyvishavarum at lata inn frágreiðingar í hesum sambandi. Víst verður til brot 5.5.1 í viðmerkingunum til lógina um annað útbjóðingarumfar.

## 2. Avtalur um menning av førleika og tøkniligum kunnleika, jvb. § 12

Loyvishavarar skulu virka fyri, at avtalur verða gjørdar millum føroysk og útlendsk virki um at menna førleika og tøkniligan kunnleika í føroyskum virkjum.

Í umsóknini skal vera ein ætlan um, hvussu umsøkjarin fer at skipa arbeiðið at menna førleika í føroyskum virkjum.

Umsøkjarin skal eisini greiða frá, hvussu hann ætlar at tryggja, at virksemið sambært hesum avtalum inniber eina støðuga menning av teimum føroysku virkjunum, sum verða fevnd av hesum avtalum.

Umsøkjarar, sum arbeiða við ítøkiligum ætlanum av hesum slagi, kunnu greiða nærri frá hesum í umsóknini.

## 3. Gransking, jvb. § 13, stk. 1

Loyvishavarar skulu leggja seg eftir at geva føroyskum útbúgvingar- og granskingarstovnum og føroyskum vinnulívi møguleikar fyri at luttaka í granskingar- og menningarætlanum.

Hevur umsøkjarin ítøkiligar ætlanir um at fara undir granskingar- og menningarætlanir í sambandi við virksemið á føroyskum øki, skal hann í umsóknini greiða frá hesum ætlanum.

Harumframt skal greiðast frá, hvussu umsøkjarin fer at skipa samstarvið við føroyskar útbúgvingar- og granskingarstovnar og føroyskt vinnulív hesum viðvíkjandi.

## 4. Útbúgvingar, jvb. § 13, stk. 2

Avtala skal gerast millum landsstýrismannin og loyvishavaran um skyldur loyvishavarans til at skipa fyri og bera kostnaðin av útbúgvingum v.m. í leitiskeiðinum.

Umsøkjarin skal vísa á, á hvørjum økjum og í hvønn mun umsøkjarin vil skipa fyri útbúgvingum av starvsfólki hjá føroyskum myndugleikum og almennum stovnum.

Umsøkjarin skal harumframt í umsókinini greiða frá, á hvørjum økjum og í hvønn mun, hann vil átaka sær at útbúgva starvsfólk hjá føroyskum fyritøkum. Talan kann eitt nú vera um starvsfólk í føroyskum fyritøkum, ið luttaka í samstarvi sambært § 12.

Nýggj avtala um útbúgvingar skal gerast, um loyvið verður longt við atliti at framleiðslu, jvb. § 13, stk. 3.

## 5. Onnur viðurskifti av týdningi fyri føroysku luttøkuna

Sambært § 15, stk. 2 skulu loyvishavarar innan 3 mánaðir eftir, at loyvið er veitt, leggja eina ætlan fyri landsstýrismannin til góðkenningar um, hvussu og hvar virksemi loyvishavarans á landi skal skipast í leitingarskeiðinum.